Færøernes Mellem- og Realskole:

# Millumskúlaflokkur í 1951



Tíðin nærkast til framsýningin av millum- og realskúlanæmingum hjá Jórunn Dánjalsdóttir fer av bakkastokki um ólavsøkumundið. Framsýningin verður í Kommunuskúlanum í Havn og letur upp við eini kvøldsetu tann 23. juli kl. 19.00 har fyrrverandi næmingar koma at hugleiða um tíðina, tá tey gingu í skúla.

Annars sigur Jórunn, at henni vantar enn fleiri realskúlamyndir, serliga frá síðst í 50-unum og fyrst í 60-unum.

Hóast tíðarfeistin til at koma við myndum er úti, vónar hon at fáa allar myndirnar til høldar.

Myndin í dag er av einum millumskúlaflokki í 1951. Aftara rað f.v.: Dan Mortensen, Tórbjørn Mikkelsen, Knút Lützen, Katrin Thorkildshøj, Sheila Marr, Anna Poulsen, og Bette Rasmussen, lærari.

Fremra rað f.v.: Petur Poulsen, Arnold Karbech Mouritsen, Bjarni Olsen, Carl Vilhelm Weihe, Ásbjørn Simonsen, Heðin Samuelsen og Helena Restorff Jacobsen.

Adressan hjá Jórunn Dánialsdóttir er Sílagøta 3, FO-100 Tórshavn. Tel. 316024 ella 226024. Myndirnar kunnu eisini latast inn "navnmerktar" í Wrangler Shop í N. Finsensgøtu 23 (tel. 314710).

*Myndaeigari: Sólrun Holm*

**Brúdleyp**

Leygardagin tann 16. juni giftast í Keypmannahavn Eyðritt Haraldsen og Jan Marseille. Brúdleypsadressan er: Fælledvej 132, 2791 Dragør

**Dagurin**

**13. juni. Kyrillos.** Fleiri halgimenni eru við hesum navni, helst er her talan um ein biskup í Aleksandriu, sum doyði í 444 . Erlendur biskupur doyði hendan dagin í 1308.

## Ein tøkk til Dánial Vang

### lærara í Fuglafjarðar skúla



Nú ætlar tú at leggja árarnar inn eftir 45 ár sum skúlalærari í Fuglafirði, har tú lærdi mínar tveir dreingir sera væl í skúlanum. Ein heilsan til tykkum bæði: Karthrinu og Dánial.

**Heilsan**
**Tórhallur Andreasen,**
**Kornblomsvej 6, DK-7700 Hederslev**

Rætting:

## Myndin var tikin á hondbóltsplenuni



Í sambandi við myndina vit høvdu í blaðnum í gjár av fimleikarum í millum- og realskúlaflokkunum í 1959, skrivaðu vit at myndin var tikin á tennisplenuni. Hetta var ikki heilt rætt. Onkur hevur gjørt vart við, at talan var um hondbóltsplenuna, sum hon var nevnd. So skuldi tað verið komið upp á pláss.

**red.**

†

## Andlát og jarðarferðir

**Hans Jacob Sigvardsen á Argjum** fer til gravar úr Argja kirkju mikudagin kl. 13.

**Hans Jacob Thomsen, Fuglafjørður**, andaðist á Landssjúkrahúsinum leygarmorgunin 9. juni, 77 ára gamal. Jarðarferðin verður úr Fuglafjarðar kirkju mikudagin kl. 14.30. Sungið verður úr Sálmabókini.

**Jens Wenningssted Tórgarð** andaðist í Hvidovre, 86 ára gamal. Jarðarferðin verður mikudagin kl. 14 úr Risbjerg kirke í Hvidovre.

**Mervyn Dimon, Tvøroyri**, andaðist sunnudagin, 82 ára gamal.

**Sylvia Gunnarsson, Tórshavn** andaðist leygardagin, 83 ára gomul. Farið verður av heiminum í Vallalíð týsdagin klokkan 17. Jarðferðin verður úr Ebenzer mikudagin klokkan 14. Tey, ið ynska at minnast Sylviu kunnu lata eina peningagávu til Zarepta. Kontur í peningastovnunum.

## Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum, sum á ein ella annan hátt sýndu samkenslu, tá okkara elskaði maður, pápi, verpápi og abbi

**Eyðin Hansen**
Hvalvík

andaðist og varð jarðaður.
Tøkk til familju og vinir, ið hjálpu til við jarðarferðina.
Tøkk til Martin R. Jacobsen prest, sangarar, berarar og kirkjutænarar.
Tøkk til Hotel Tórshavn og starvsfólkið har fyri stórt hjálpsemi.
Tøkk til heimasjúkrasystrarnar fyri stórt hjálpsemi hansara seinastu dagar.
Tøkk fyri heilsanir, uppringingar, kransar og peningagávur.
Eisini tøkk til tykkum mongu, ið fylgdu honum til hansara seinasta hvíldarstað.

**Helena og børnini v/familjum**

## Tøkk

Vit takka hjartaliga fyri sýndu samkenslu, tá okkara kæri pápi, verpápi, abbi og langabbi

**Janus Drangá**

andaðist og varð jarðaður.
Takk til prestarnar Bjarna Bæk og Emil Olsen, gravararnar, berararnar, klokkara, organist og sangararnar.
Tøkk fyri hjálpandi hond til ervið og takk fyri blómur og kransar.

*Familjunnar vegna*
**Suni og Turid**